# Heimssamfelag ella heimføðisskapur

DÁVID ISFELD



Eg havi hoyrt og lisið um mangan føroying, sum talar ímóti altjóðagerðini og vilja ikki hoyra um, at Føroyar skulu luttaka í, ella gerast ein partur av, heimssamfelagnum. Men tað svarar til at ynskja, at vera og liva á eini aðrari gongustjørnu. Tað er við øðrum orðum bæði vónleyst og ógjørligt.

Hetta fær meg at koma í tankar um, at fyri at spara, vilja mong hava Uttanríkisráðið niðurlagt. Typisk føroysk reaktión. Tað fyrsta, ið lagt verður eftir, er tað, sum skapar handilssambond og diplomatisk sambond. Tað er tí, at tað luktar ov nógv av sjálvrræði, initiativ og ábyrgd, so tað má niðurleggjast.

Tað er júst tí, at tað er so týdningarmikið at fáa heimføðingin úr føroyinginum. Heimføðingurin tarnar alla menning. Hesin sinnisstandur má tískil halda uppat nú, tí hann er skaðiligur fyri allan framburð í vinnuni; og slík tankagongd er avlíkavæl farin yvir síðsta søludag - tað er eisini tí, at næstan eingin keypur hatta longur. Men tey, sum hava keypt ov gamlar hugsanir og fatanir eru meinbogar fyri teimum, sum vilja meira við lívinum og fyri Føroyar, tí tey eru ein partur av arbeiðsmarknaðinum, sum skal vera dynamiskur og ikki stirvin - stirvin og konservativ fólk velja eisini stirvnar, konservativar og visjónsleysar politikarar.

**Heimurin fullur av møguleikum**

Eg hoyrdi í útvarpinum í viku 3, at vit ikki kunnu velja globaliseringina frá, tí at hon kemur inn á okkum uttan mun til, um vit ynskja at vera ein partur av heimssamfelagnum ella ikki. Beinanvegin rann mær í hug allar teir føroyingar, sum helst vilja halda á fram við at "ganga í grind", ræna egg, skjóta haru og fugl, hava seyð og gæs og fara á flot, fyri síðani at gera eitt sindur av nútíðmans "siviliseraðum" arbeiði í smáu intervallunum millum "innløguarbeiðini".

Eg vil ikki vera tann, sum brestur bløðruna, ið inniheldur ta fatan, at áðurnevndu miðaldarlivibreyð eru hornasteinar í føroyska samfelagnum; bæði hvat ið lívsuppihald og mentan viðvíkur, men tað er altso ikki fuglur, grind og knæbóndavirksemi, ið ber búskapin. Tó vil eg taka undir við, at áðurnevndu hættir at vinna sær eitt sindur av tí besta og mest vistfrøðiliga mati her um leiðir, er ein góð og livandi mentan. Vit mugu bara gevast við at halda, at hesi ítriv eru annað enn ítriv; hóast tað er eitt matískoyti. Ov nógvir føroyingar raðfesta hesi ítriv fram um arbeiði. Tað er ikki gagnligt fyri arbeiðseffektivitetin, búskapin og síðani vælferðarsamfelagið - mangir løkir smáir - og tí meini eg, at ein nútíðmans hugburður má avloysa tann gamla skjótast gjørligt.

Vit mugu lata dyrnar upp fyri heiminum, og eisini sjálv fara út í heim og hava vitan og førleikar við heim aftur. Vit mugu ómøguligt varðveita tann mentala kinverka múrin, sum hevur verið í gerð ov leingi um Føroya land og fólk.

Vit verja ikki okkum sjálv við at útihýsa heimin uttan fyri Ríkisfelagsskapin, vit avmarka bert okkara egnu handilsmøguleikar og gera sostatt okkara forhandlingsplattform veikan og fáa vánaligar avtalur; og tað er ein orsøk til, at alt, sum vit keypa í Føroyum t.d. matur, tól og amboð, er dýrari enn tað nýtist at vera. Hygg eftir prísunum í Týsklandi og Bretlandi, so fert tú at undrast á, hví føroyskar fyritøkur keypa allar sínar vørur úr Danmark.

# Sjarrligir tjóðveldismenn hava fingið koyrilin

ROLF GUTTESEN



Ein lítil stubbi frá Virgari Dalsgaard hevur vakt mikla øsing millum fjaðursárar nationalistar. Virgar vísir á eina fólksins rødd (vox populi) frá manni, ið siglur úti, hevur víst á løgin ting í føroyskum politikki.

Víðari vísir hann á søgulig fakta, sum grunnir nationalistar helst einki vita um. Hann vísir á fakta, at tað var javnaðarformaðurin P. M. Dam, sum síðst í 50'unum legði grundina til nútíðar vælferðarsamfelagið í Føroyum. Og at tað var við danskari hjálp, at tað bleiv bygt upp. Ikki bara tað sociala økið bleiv bygt upp soleiðis, men vinnulívið og infrastrukturin bleiv bygdur upp av Realkredittinum, 60-milliónagrunninum, Føroyagrunninum, Egnsudviklingsfonden og nógvum øðrum tiltøkum.

**Sjarligir tjóðveldismenn**

duga annars at brúka kjaft Dávid Isfeldt letst einki at vita um søgulig fakta. Í hvussu so er brúkar hann bara plássið í Dimmu og Sosialinum upp á at eymkast og gremjast um, at Virgar brúkar hørð orð um 'fullveldisdólgar og ábyrgdarloysingar'. Men ikki eitt orð um innihaldið, substansin ella søgulig fakta.

So, skula tjóðveldisfólk og aðrir nationalistar gremja seg um at fáa koyrilin? Gremja seg um, at orðini ikki eru rósandi, herðaklappandi, sjálvforherligandi? Teir sum í 50-80 ár hava gingið fremstir í grovum málbrúki, útspilling og eisini regulerari terrorismu? Ja, terrorismu av grovasta slag hava teir, ekstremu nationalistarnir, fleiri ferður brúkt. Veit Isfeldt ikki tað? Hann spyr óvitandi »Meinar Virgar, at tjóðveldisfólk eru terroristar?« Tað kann Virgar helst geva mong dømir um. Eg vil minna á, at ekstremir nationalistar hava gjørt nøkur ting, sum tíverri næstan eru tagd burtur. So eg vil siga, ja, nakrir ekstremir nationalistar hava verið terroristar. Men tað finnast jú eisini friðarlig tjóðveldisfólk, og rokni við at Isfeldt er ein av teimum.

**Nøkur dømir um nationalistiska terrorismu**

Í 1945 sprongdist ein bumba undir Tinghúsinum, sum var so kraftig, at húsið lyftist uppfrá, fór illa, allir rútar knústir, líka sum rútar í bókhandlinum og kommunuskúlanum og aðrastaðni fóru í knús. Skúlin varð stongdur í fleiri dagar. Bumban var ætlað P. M. Dam, sum einsamallur hevði sitið og arbeitt í Tinghúsinum tað kvøldið.

Seinni, einaferð í 50'unum, varð skotið við riflu móti Kr. Djurhuus á Tvøroyri. Skotini fóru gjøgnum rútarnar í sovikamarinum og stóðu eftir í songarstokkinum. Kr. Djurhuus bleiv tó ikki raktur. Hús hjá einum moderatum sjálvstýrispolitikara í Havn blivu meiggjaði til við máling og lorti, og hann bleiv terroriseraður pr telefon og upp á nógvar aðrar mátar.

Í einum tíðarskeiði var tað so, at tá Dam kom úr Suðri við Smyrli, ringdi hann altíð framman undan og segði frá, so at partamenn kundu koma á keiina og vera 'body-guards' og fáa hann óskaddan til hús. Tó mundi endað galið eina ferð úti í Sigmundargøtu, har Jóan Petur Davidsen, javnaðarmaður av Sandi, og Dam komu gangandi eitt kvøldi. Ein lastbilur royndi at koyra teir niður. Jóan Petur var sterkur og kvikur, syfti Dam upp um ein garð. Annars hevði staðið illa til. Pálmasunnudag 1958 var kravgonga móti nato. Dam kom sama kvøld upp við Tjaldrinum, og í tí hann kom í land, fekk hann eina stong við einum skelti í høvdið av einum fanatiskum tjóðveldismanni.

**Isfeldt dugir eisini við grovheitum**

Stubbin hjá Isfeldt, sum ikki tekur støðu til nakað konkret innihald, uttan bara orðavalið ella stílin hjá Virgari, endar tó við fleiri grovheitum. Ikki minst at samanbera skrivingina hjá Virgari við »týsk bumbuflogfør yvir London.« Og mín sann um hann ikki til endans hevjar seg upp til at tala vegna allar føroyingar. Hatta er nakað nógv. Enn hava fólk ymsar meiningar, og ymsir flokkar eru til. Tað eru so slett ikki allir føroyingar, sum halda at Tjóðveldisflokkurin og Hoydal er svarið.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er eisini fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

# Vitan treyt fyri framburði

TÓRA VIÐ KELDU



Duga vit í veruleikanum at síggja møguleikarnar og avbjóðingina í útbúgving, og týdningin vitan hevur fyri samfelag okkara? Tí eingin ivi er um, at lítla demokratiska vælferðarsamfelag okkara, sum júst av somu orsøk er sera viðkvæmt, er treytað av teimum, sum velja at virka her.

**Vitan og gransking**

Vitan er ein treyt fyri framburði. Sum fiskivinnutjóð eru vit bundin av, at fiskivinnan gevur eitt avkast, sum kann fíggja samfelagið - vælferð, vinnu, útbúgving, gransking og arbeiðspláss. Fiskivinnan er í dag so at siga einasta inntøkukelda hjá landskassanum. Ein nýggj vinna við fíggjarligum avkasti er tí sjálvsagt kærkomin.

Sum eitt gott grundarlag og íløgu ger samfelagið tí tað einasta rætta at bjóða børnum og ungum møguleika at vinna sær vitan, sum við tíðini kann gerast samfelags-vinningur.

Skúlin ein íløga

Tá børn gerast næmingar byrjar lestrarlívið av álvara. Hetta er ein stór avbjóðing, sum flestu børn megna væl. Fyrstu úrslitini síggjast rættiliga skjótt og viðurkenningin er dagligur gestur. Hesi livandi og skapandi børn gerast við tíðini kend við avbjóðandi gerandisdagin.

Samfelagið hevur valt at útbúgva børn og ung. Tí er hetta ein íløga, sum samfelagið ger - í og við at gjalda høli, tilfar og lønir.

**Útbúgving vinningur**

Eftir lokið fólkaskúlaprógv fara flest allir næmingarnir víðari á miðnám. Hetta er ein av stóru samfelagsíløgunum, sum afturat karmum og lønum veitir týðandi ískoyti til til lesandi fyri mongu útreiðslurnar.

Í fimm økjum bjóðar samfelagið ungum at lesa - Suðuroy, Suðurstreymoy, Norðurstreymoy, Eysturoy og í Norðoyggjum. Skúlar, sum eru viðurkendir, og sum í altjóða kappingum hava staðið seg væl.

**Úrtøkan**

Hvat vit síggja aftur í samfelagnum av øllum hesum. Jú, tey ungu eru væl fyri at fáa sær eina útbúgving og klára seg væl - eisini samanborið við onnur lond. Íløgan samfelagið ger í føroyska fólkaskúlan og hægri skúlarnar, gevur føroyska ungdóminum møguleika at skapa eitt gott lív og eina spennandi framtíð.

Havi tó hug at seta spurningin opnan: Duga vit í veruleikanum at síggja avbjóðingina í júst hesum møguleikanum, og týdningin útbúgving hevur fyri samfelag okkara? Hvussu fáa vit vitan og skúlaskap at gerast ein náttúrligur partur av samfelagnum og møguliga eina inntøkukeldu?

**Samfelagið**

Seinastu tíðina hevur kjak stungið seg upp um, hvussu vit fáa tey, sum hava nomið sær vitan í øðrum londum aftur til Føroyar at búseta seg. Hildið verður, at samfelagið skal bjóða útbúna fólkinum aftur til landið til eitt "gott" starv í einum komandi granskingarumhvørvi ella í nýggjum størvum, sum ongin rættiliga veit, hvørji eru.

Eg veit ikki, um onnur undrast, men tað geri eg. Haldi, hetta er at taka seinasta brikkin fyrst. Eg skilji væl grundgevingina fyri, at landið hevur brúk fyri vitan. Tó er alt hetta treytað hugsjónum og vilja hjá teimum, sum longu búleikast her. Aftur at hesum er spurningurin, hvat føroyski búskapurin, við so at siga einari inntøkukeldu, kann bera.

Skal samfelagið lagast eftir teimum, sum lesa og møguliga koma aftur til eitt starv her? Eg havi hug at halda, at samfelagið eigur at vísa vilja at vaksa seg sterkari við teimum, sum longu búgva her, við langtíðarætlanum fyri, hvussu samfelagið skal skipast, og geva greiðar útmeldingar um, hvat er at gera. Neyðugt er at vísa í verki virðing fyri vitan, skúlaskapi og gransking, sum ein týðandi part av mentan okkara - tá kunnu vit fara út at bjóða heim.